## VIÐMERKINGAR

# Tey ungu eru dýrgripir Føroya

**Annika Olsen**
*cand.mag.*
*Valevni Fólkafloksins*
*í Suðurstreymi*



Nú vallyftini av álvara eru farin á rull, hevur tað undrað meg, at ongin tekur trupulleikarnir hjá teimum ungu uppá tunguna. Flott orð sum til t.d., at ungdómurin er okkara vón og stoltleiki sýnast at vera tóm orð, tí onki verður gjørt fyri at bøta um trupulleikarnir hjá hesum bólki. Tað snýr seg serliga um bústaðarmøguleikarnir hjá teimum lesandi og tann óvirðuliga lága studningin, ið tey fáa frá landinum, ein studningur, sum tey hvørki kunnu liva ella doyggja av.

**Miðstaðarøki ein trupulleiki**
Tað er serliga í miðstaðarøkinum, at trupulleikarnir stinga seg upp, av tí at tað er her, tey flestu nema sær útbúgving. Tað er næstan ómøguligt at fáa sær eina íbúð, og tey fáu "heldigu", sum finna sær eina íbúð, mugu av við 4 -5 000 krónur um mánaðin, sum skal gjaldast av tí ómenniskjaliga og óvirðiliga studninginum uppá 3300 krónur. Hvussu kunnu tey lesandi fáa tingini til at hanga saman? Tosað verður jú nógv um vælferð í hesum tíðum, men er hetta vælferð? Tað sær út til, at tað bert eru tey lesandi, ið fáa hollan búskaparligan stuðul heimanifrá, ið hava møguleika fyri at fáa sær íbúð, og tað hevur onki við vælferð at gera. Restin má hava fult starv við við síðuna av lesnaðinum, fyri at kunna gjalda íbúð og fyri at fáa mat í munnin. Hetta viðførir, at lesnaðurin verður merktur av hesum bæði í dygd og í tíð.

**Kollegium**
Loysnin hevði verið at bygt eitt kollegium, sum øll onnur vælferðarsamfeløg í norðanlondum hava, har lesandi kunnu búgva til ein sámuligan kostnað, ið samsvarar við teirra neyðarsliga studning og ikki eina fasta inntøku uppá 15-20.000 um mánaðin.

**Aðrir ágóðar**
Eisini hevði tað hjálpt munandi hjá teimum lesandi, um tey fingu nakrar ágóðar sum t.d. hálvt sjónvarpsgjald og útvarpsgjald og ein avsláttur uppá sjúkrakassan, tí hvør króna hevur týdning. Um tey ungu skulu hava møguleika fyri at hugsa um teirra lesnað og ikki um, hvussu tey búskaparliga kunnu fáa tingini til at hanga saman, er tað altavgerandi, at farið verður til verka og bøtt uppá hesa óvirðiligu støðu, tey lesandi eru í. Hetta er av alstórum týdningi, tí tað er m.a. tann kvalitativa vitanin hjá teimum lesandi, ið samfelagið skal byggja uppá!

# Framtíð Føroya fólks

**Reimund Langgaard**
*valevni*
*Sambandsfloksins*
*í Eysturoy*



Vit hava tey seinastu árini goldið niður okkara uttanlandaskuld og sett pening til síðis. Hetta er at fegnast um. Rætt er at leggja tilsíðis í góðum tíðum, so nakað er at standa ímóti við, tá tíðirnar eru minni góðar.

Tað er tí hugstoytt at síggja, at vit smb. fíggjarlógini fyri 2002 bert hava eitt yvirskot uppá góðar 121 mió. kr. Avdrátturin uppá almennu skuldina verður í 2002 140 mió. kr., og tí verður minni í almenna kassanum við árslok, enn tá árið byrjaði. Ikki kann sigast, at fíggjarpolitikkurin er forsvarligur, tá ein ikki megnar at leggja tilsíðis, nú tíðirnar eru so góðar. Tá ein so samstundis hugsar um, at tað uppi í Løgtinginum t.d. liggur eitt uppskot um at lækka skattainntøkurnar við 80 mió. kr. er eyðsæð, at talan ikki er um serliga forsvarligan fíggjarpolitik.

Um fiskaprísurin heldur áfram við at lækka, gongur ikki long tíð fyrr enn henda gongd sæst aftur í inntøkunum hjá landskassanum, og hesin skjótt kann fáa sera stór undirskot. Tað má tí verða einumhvørjum greitt, at verðandi samgonga hevur gjørt eina dáragerð, tá hon lækkaði blokkin við ikki minni enn 366 mió. kr.

Eg eri stórliga bangin fyri, at komandi árini koma at hava óhepnar fylgir fyri fleiri í okkara samfelag um verðandi samgonga sleppur at halda áfram. Her hugsi eg serliga um tey gomlu, sjúku, óarbeiðsføru og barnafamiljurnar. Ein partur av fólkinum fer helst at klára seg hóast alt, sjálvt um tað hevur við sær eina lægri vælferð, men tað er okkara skylda at hugsa um øll í samfelagnum, og ikki bert tey, sum eru væl fyri.

Sambandsflokkurin vil arbeiða fyri at verðveita vælferðina í Føroyum, soleiðis at vit hava somu vælferð sum okkara grannalond. Hendan vælferð er trygg í ríkisfelagsskapi við Danmark.

# Minni inntøku meira vælferð?

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Síðani samgonguskjalið varð undirskrivað, kunnu vit eygleiðarar ikki gera annað enn undrast, ikki tí, tað man neyvan verða nøkur samgonga, sum hevur brúkt so nógva orku, og so nógvar pengar uppá marknaðarføring av fullveldinum, tað fullveldi, sum í veruleikanum bara tann eini flokkurin meinar í álvara.

Kann verða, at vit uttanfyri ikki skilja, hvat gongur fyri seg, men tú skalt ikki vera serliga gløggur fyri at síggja, at tann eini flokkurin, hevur meira enn ringt við at halda gjørdar avtalur og vil at Tjóðveldisflokkurin skal gera samgonguslit, men tað veit Tjóðveldisflokkurin, so teir fara sjálvandi ikki at slíta samgonguna,

Tann størsta undanførslan var, at vit skuldu ikki hava fólkaatkvøðu um fullveldi, eftirsum meiningarkanningarnar søgdu kortanei, og um úrslitið var eitt nei til fullveldi, so høvdu vit endaliga limað okkum inn í tað danska ríkið, t. v. s limað okkum inn í tað ríkið, sum vit skulu halda fólkaatkvøðu um at koma burturúr?

Hinvegin fær fíggjarmálaráðharrin brúk fyri allari uppsparingini tey næstu árini, soleiðis sum fleiri síggja ávísar vinnugreinar í løtuni, so eg trúgvi, at prátið um yvirtøkur kemur at kámast eitt sindur av sær sjálvum.

Og lat meg fyri eina ordans skyld gera vart við ein týdningarmiklan realitet í føroyska búskapinum, nemliga at seinastu fimm árini hava vit megnað at økt um vælferðina, og visti eg ikki betur, so hevði eg hildið at alt stóð væl til.

Men við at hyggja eftir nøkrum hagtølum, so kunna vit staðfesta, at meðallønirnar fyri allar lønarbólkar seinastu fimm árini eru hækkaðar, men prísvøksturin hevur etið hækkingarnar upp, og væl tað, soleiðis at keypiorkan í landinum, er minkað við uml 11,3%

Fyri at fáa sjón fyri søgn, so far inn í ein handil og keyp 2 mjólkapakkar, ein ost og tvey breyð, so hevur tú brúkt uml 100 kr, fyri fimm árum síðani hevði sama vøra kosta uml 89 kr, vit mugu til at prístalsregulera, soleiðis at løntakarar við lág- og meðalinntøkum, kunnu hava meiri at keypa mat og klæði fyri.

Fólkaflokkurin er byrjaður sítt valstríð við at geva 80 mill í skattalætta afturvirkandi, uttanum samgonguna hjá sær sjálvum, og aftan á at Fíggjarlógin er gjørd fyri land og kommunur, haldi sum flestu fólk, at hettar er ógvuliga langt úti, og sigur hettar mær, hvussu kroystur flokkurin er, og ikki munnu bý- og bygdaráðslimir verða glaðir fyri henda ósakliga mátan at arbeiða uppá, eg veit at skilafólk og vinnulívsmenn hjá sama flokki eru alt annað enn nøgd vit hendan mátan at arbeiða upp á.

Hinvegin segði fíggjarmálaráðharrin, at vit við at geva 80 mill í skattalætta, seta vælferðina uppá spæl, vit hava akkurát tikið 364 mill kr frá inntøkusíðuni við lyftinum um, at tað kemur ikki at kosta vælferð, her er onkur logikkur, sum ikki hongur saman, ella hvussu?

# Norðuratlantiska samgongan skal halda fingrarnar burtur

**Eyðólv Dimon**
*Valevni í Suðurstreymoy*



Eftir at hava sitið og hugt at Degi og viku mánakvøldið, sær nú út til, at Tjóðveldisflokkurin, við hjálp frá grønlendsku fólkatingslimunum, ætlar at taka avgerðina um framtíð føroyinga úr hondunum á Løgtinginum. Úrslitið av fólkatingsvalinum vísti, at meirilutin av føroysku veljarunum vildi hava landsstýrið at skifta kós frá fullveldispolitikkinum. Tá vísti formaður Tjóðveldisfloksins hesum aftur og segði, at eitt úrslit av einum fólkatingsvali onki hevði við heimliga politikkin at gera. Nú kom so aftur ein veljarakanning, sum enn einaferð royndi at purra út. Men hesaferð royndi Høgni Hoydal at burturforklára úrslitið við undanførslum sum, at spurningarnir í veljarakanningini ikki vóru nóg greitt orðaðir. Hesa undanførslu hava vit hoyrt fyrr. Føroyingar hava fingið nokk av fullveldiskósini, og 59% av føroysku veljarunum taka nú undir við "víðkaðum sjálvstýri innanfyri ríkisfelagskapin". Hetta er helst eitt álvarsligt bakkast fyri Landsstýrismannin í fullveldismálum, sum hevur sitið handan veggirnar í Tinganesi og fullkomiliga hevur mist sambandið við veljaran.

**Sær skriftina á vegginum**
Nú hann er útpurraður og sær skriftina á vegginum, roynir Tjóðveldisflokkurin at taka málið úr hondunum á Løgtinginum og føroyingum. Norðuratlantiska samgongan skal føra fullveldispolitikkin víðari, hóast meirilutin av føroysku veljarunum ynskir at skifta kós. Norðuratlantiska samgongan eigur at viðurkenna rætt føroyinga til sjálvir at avgera framtíð sína. Hesa avgerð fara føroyingar at taka á komandi løgtingsvalið. Í løtuni er tað alt, ið bendir á, at Tjóðveldisflokkurin, við sínum ikki semjusøkjandi politikki, setur seg uttanfyri ávirkan eftir valið.

**Viðurkennir ikki Løgtingið**
Tann breiða politiska semjan kann bara byggjast á ein politikk, har Sjálvstýrislógin er grundarlagið. Henda semja fer ikki at finna seg í, at Norðatlantiska samgongan tekur málið úr hondunum á føroyingum. Tað er á Føroya Løgtingið at avgerðin skal takast, um hvat skal henda í ríkisrættarligu støðuni hjá føroyingum. Hetta eigur Norðuratlantiska samgongan at virða, og fólkatingslimirnir eiga at halda fingrarnar burtur.